# Fordómar og stereotypur

Næmingabók, síða 20-27

Førleikar

- At eygleiða einfaldar samfelagsligar samanhangir í nærumhvørvinum. At gera kanningararbeiði úti í samfelagnum, har smærri einfaldar samrøður ella spurnakanningar verða nýttar.
- At leita sær týðandi og álítandi vitan, bæði gjøgnum internetið og fysiskar miðlar. At nýta grundleggjandi keldukritikk.
- At leggja fram faklig úrslit munnliga. At brúka ymiskar framløguhættir, m.a. eisini at brúka KT at stuðla framløgur við.

Tá vit hugsa um útlendingar, hugsa vit ofta um nakrar serligar eginleikar við hesum fólkasløgum. Hóast russar, týskarar, kinesarar o.s.fr. eru sera ymiskir, hava vit ofta eina einfaldgjørda fatan av hvussu fólkini munnu vera. Á myndini niðanfyri eru nøkur dømi um stereotypur av fólkasløgum. Kenna tit tær aftur?




Býtið flokkin upp í 5 bólkar. Hvør bólkur velur síðani eitt land at viðgera. Tó mugu allir bólkar hava ymisk lond! Hvør bólkur fær uppgávuna at skriva 10 eginleikar hjá íbúgvunum í valda landinum. Hetta verður skrivað niður á eitt papír. Eftir hetta fara øll papírini á rundferð til hinar bólkarnar. Hvør bólkur leggur ein eginleika afturat, ið vantar á papírinum. At enda kemur papírið aftur til upprunabólkarnar, ið evna til eina plakat, har eginleikarnir eru bólkaðir sum jaligir, neutralir og neiligir. Finnið eisini fram myndir, ið vísa ymiskar av eginleikunum. Bólkarnir mugu hava møguleika at leita sær vitan á Internetinum. Eftir hetta leggja bólkarnir fram sína plakat og meta um hvussu eftirfarandi ymisku eginleikarnir eru.